at hava eitt fokus, at lurta og vera nærverandi, og ikki lata alt annað rumstera í høvdinum samstundis sum tú skalt eitast at tala við eina aðra menniskju. Kvalitetstíð er tí ein tíð, sum er avsett til eitt serligt endamál, og kvalitetstíð krevur, at heilin frammanundan er nulstillaður, at fartelefonin er sløkt, og har tú heldur ikki roynir at lesa bløðini samstundis, sum tú talar við ein annan. Tað ber sjálvandi til at avseta slíka kvalitetstíð til privat viðurskifti í kallendaran, eina tíð, tá babbar ikki mugu forstýrast av øðrum enn sínum egnu.

Teir, sum lurtaðu eftir fyrilestrinum hjá vinmanni mínum, góvu honum rætt, men sum ein áhoyrari segði, hvar skuldi hann í einum samdøgri, sum bert hevði 24 tímar finna avlopstíð, sum kundi brúkast til kvalitetstíð?

Tíbetur hava tey heilt smáu enn ikki kallendarar, men tað gongur ikki leingi, so hava tey eitt sindur størru børnini sínu egnu tíð at halda skil á – tað er so nógv, sum tey skulu til, spæla floytu, violin, fótbólt, skótavirksemi og hvørt av sínum. Tey kenna tey elektronisku tólini betri enn vit eldru. Tá er bert at vóna, at kallendararnir hjá børnum og foreldrum eru koordineraðir, og at kvalitetstíð finnst sum avlopstíð hjá báðum pørtum. Tað er longu mangastaðini soleiðis, at tað er bert hendingaferð, at tað lukkast familjuni at sita og eta saman um eitt og sama borð.

Tíðin er ein sera avgerandi faktor í øllum virksemi okkara. Tíð er ein knappheit hjá øllum og tí eisini eitt ríkidømi, men tú fært ikki rættiliga gleði av hesum ríkidømi, uttan tú hevur tað saman við øðrum.. Hygg í kallendarin og kanna eftir um tú kannst, verður alt vanligari at hoyra.

## Afturvendandi tíð

Eitt er at tíðin, sum rennur sum streymur í á, og at tíð er farin tá hon er farin, men tað er onnur tíð av øðrum náttúrugivnum, mentanarligum ella samfelagsligum slag, sum kemur aftur á hvørjum ári. Árstíðirnar eru besta dømi um ta syklisku ella ta afturvendandi tíðina. Eftir vetur kemur vár, eftir vár summar, eftir summar heyst og eftir heyst vetur. Soleiðis er á hvørjum ári.

Náttúran rundanum ber sína egnu tíð í sær og ger hana sjónliga á so mangan hátt á hvørjum ári. Fuglurin kemur til landið til ásettar tíð, og fiskurin kemur á grunnarnar til ásettu tíðirnar og sjálvt grasið fer at grógva, tá tíðin hjá tí er komin, og soleiðis er við øllum blómum og ávøkstri.

Hetta er ein tíð, sum vit mugu taka til okkum og frøast um, tá hon kemur. Eitt nú er stytsti dagur farin aftur um bak, og nú fara dagarnir at leingjast aftur og so byrjar alt aftur av nýggjum.

Í flestu bygdum er enn farvegur eftir sólarmerknunum í bø og haga, so tað ber til at meta um, hvat klokkan er. Við at sameina sól og landafrøðilig merkir ber til at fáa eina fatan av tíðini sjálvt um ein ikki hevur klokku uppu á sær. Eitt annað var at fólk – kanska meira fyrr – eisini hava eitt lívfrøðiligt ur í sær. Flestu vakna til ávísa tíð og vilja sova til ávísa tíð, men tað er ikki altíð at slíkar rútmur hóska til tað lív, sum verður kraft av okkum menniskjum.

Umframt ta náttúrugivnu afturvendandi tíðina, so hava vit menniskju eisini sjálvi skapað eina tíð, sum lív okkara er ein partur í. Tá Gud skapti heimin, arbeiddi hann í 6 dagar, men tann 7. dagin hvíldi hann. Hetta hevur menniskjað eisini gjørt til sítt, men í dag arbeiða vit í 5 dagar og hava frí í tveir. Leygardag og sunnudag hava vit frí frá arbeiði okkara, og eiga tíðina sjálvi. Men tað eru tey, sum eru noydd at arbeiða í vikuskiftunum, men so fáa tey frí aðrar dagar ella fáa eitt lønarískoyti.

Umframt sunnudagin, sum enn verður hildin rættiliga heilagur her heima í Føroyum, so hava vit eisini fleiri aðrar halgidagar, sum verða hildnir sum sunnudagar, men sum tað verður gjørt meira burturúr enn vanligum sunnudøgunum. Her eru jólini eitt gott dømi. Kirkjuárið byrjar við fyrsta sunnudegi í advent og fevnir um allar hinar sunnu- og heiligdagar í kirkjuárunum, sum endar við teimum mongu sunnudøgunum eftir trinitatis.

Men árið er ikki bert eitt kirkjuár, tað er eisini eitt ítróttarár ella eitt kappingarár við fastløgdum dystum. Eisini hava vit allar summarstevnurnar. Ólavsøka, tá tingið verður sett eftir skrúgonguna ólavsøkudag, er ein samanrenning av einum verðsligum og andaligum halgidegi.Tað minnir meg um, at vit fjórða hvørt ár eisini hava eitt politiskt ár, tá vit fara á val.

Vetrartíð er veitslutíð verður ofta sagt. Fyrr var tað so, at tað var um heystið at tað var nóg mikið til av øllum bæði eplum og kjøti, tí var tað eisini um heystið, at fólk fyrr hildu brúdleyp, men hetta er vorðið øðrvísi, tí í dag er tað mest um summarið, at fólk giftast, tí globaliseringin hevur gjørt, at tað er nóg mikið av brúdleypsmati at fáa mestsum hvønn dag í árinum. Um summarið eru eisini ungfólkini heima, og tað eru fyri tað mesta tey ungu, sum giftast.

Men munnu vit ikki enn eisini hava brúk fyri veitslum ta myrku vetrardagarnar eins og fyrr. Her hugsi eg serliga um øll jólaborðini upp undir jól. Tey gera helst somu nyttu sum øll gomlu gildini tey fyrr høvdu um jóltíðir: bátsgildi, neytakonugildi og hvørt av sínum. Trongdin í menniskjanum at skapa sær tíðir við gildum og fest sum frávik frá yrkadegnum er líka so gomul sum menniskjan sjálv, antin gildini eru heima hjá okkum sjálvum ella umgjørd til skíferiur ella vetraferiur í øðrum londum, meiningin er tann sama.



*Tað at rudda ella beina burtur rusk er fyri tey flestu ein formur fyri katarsis, ein reinsilsisprosess, har fyribeiningin av óruddinum á ein ella annan hátt eisini reinsar og gevur frið í sálina og skapar eina nýggja tíð – eina nýggja byrjan.*

## At hava góða ella ringa tíð

Øll kenna vit fólk sum altíð hava góða tíð og fólk sum altíð hava ringa tíð. Tey eru stressað av øllum, bæði tí, sum tey skulu gera, tað, sum tey gera, tað sum tey hava gjørt og sjálvandi allarmest at tí, sum tey ikki fáa gjørt – og so stressa tey eisini onnur. So eru tað tey, sum altíð tykjast at hava góða tíð, sum kunnu steðga á og seta tíð av at tosa við onnur, men tey koma eisini á mál við tí, sum tey gera, og tey hava veruliga góða tíð, kanska júst tí tey hava yvirblikk, og duga at skilja millum tað, sum í løtuni hevur týdning og tað, sum hevur minni týdning. Men tað eru eisini tey, sum søpla tíðina burtur, uttan at vita hvussu. Men øll eru vit av og á í teirri støðu at tíðin fer undan okkum, tá er einki annað at gera enn at skunda sær.

Tað var ein stjóri her í Havn, sum ofta tók hýruvogn til arbeiðis, ikki tí at hann ikki vildi ganga, men tí, at tað tók honum so nógva tíð at koma ígjøgnum býin. Honum dámdi sjálvur væl at práta, og fólk vildu fegin práta við hann. Hann møtti so nógvum fólki, sum fegin vildu tosa við hann, og sum hann sjálvur eisini fegin vildi tosa við. Men tað tók alt ov langa tíð hjá honum at koma fram. Hetta helt hann ikki kundi bera til, tí mátti hann taka hýruvogn, tá nógv stóð á. Hann var komin í eitt krysspress, tí mundi hann ikki innast inni halda, at hesi prátini vóru góðar løtur - kvalitetstíð, sum gjørdu honum lívið ríkari.

Leygardagur er ofta ein dagur, tá fólk vanliga hava rímiliga góða tíð. Tak nú onkran leygardag tá tú fert til handils, tá rokna tey flestu við, at ein hevur tíð til at skifta nøkur orð og andlitini eru opin og móttakilig. Øðrvísi er tað, tá tú hevur ringa tíð, tá tú spurtar avstað fyri at finna okkurt til døgurða, og tú veitst at bíðað verður eftir tær heima. Tá ræður um at hava eina medferð og eitt andlitsbráð, sum ger at tú ongan sært, og at eingin talar til tín. Øll síggja, at tú hevur ringa tíð.

Fert tú hinvegin ein leygardag niðan á Ruskstøðina í Havn, so er tað eisini eitt sindur av time-out. Har kanst tú hitta fólk, sum annars ganga í slipsi og kragatoyi í vásaklæðum. Tað lýsir langt burtur frá teimum, at tey nýta hetta tíðarfrælsi at kunna ripa pappeskjur, ruskposar og annað órudd í konteynararnar, sum standa har lið um lið. Konteynarar til ymisk endamál: smátt rusk at brenna, stórt rusk at brenna, elkáplar, møblar, køliskáp. You name it, sum bretar siga. Har er rúm fyri øllum.

Tað at rudda ella beina burtur rusk er fyri tey flestu ein formur fyri katarsis, ein reinsilsisprosess, har fyribeiningin av óruddinum á ein ella annan hátt eisini reinsar og gevur frið í sálina og skapar eina nýggja tíð – eina nýggja byrjan. Her á Ruskstøðini eru kortini ikki stundir til tað stóra orðaskiftið, tí bilarnir standa vanliga og bíða eftir hvørjum øðrum, men tað er einki stress at síggja, men blíð og órakaði andlit og konufólkini hugsa ikki so nógv um frisýruna ein dag á ruskstøðini, men tey eru ikki so nógv heldur.

Júst, tað inn ímillum at geva sær stundir at práta saman – eisini á arbeiðsplássinum, gevur okkum ríkar løtur í lívinum, tá vit missa tamarhaldið á tíðini, sum tykist at standa still í nærveruni millum menniskju. Kenna fólk seg glað og løtt í sinninum, gera tey eisini sítt arbeiði léttari og betri.

Sum tú rópar so ekkóar tað aftur. Eitt smíl skapar eitt annað smíl, og ein illfýsin ella gronut viðmerking skapar eina aðra gronuta virðmerking. Vit kunnu soleiðis sjálvi gera nógv til, at tann tíð vit hava verður ein góð tíð. Hin vegin kann ein skemtilig viðmerking eisini hjálpa uppá ringt lag og lokka skálkabrosið fram, men tað eru tíðir, tá slíkt ikki loysir seg, men best er at lata fólk fáa frið t.d. um morgunun.

Humor er altíð eitt gott innslag, men um tú ikki skal koma illa fyri av orðum við sarkasmu og ironi, so krevur tað, at móttakarin og ikki minst tú sjálvur, er meira en vanliga skilagóður, tí ert tú sarkastiskur ella ironiskur rørir tú teg á eini knívsegg, og tað krevur eitt rættiliga sublimt forstáilsi, sum tú ikki kanst vænta at øll hava, og vandin fyri alvorligum missiljingum er sera stórur. Tað kann skjótt koma at verða til angurstíð. Men nú eri eg við at villa meg burtur frá tí evni, sum eg skal tosa um, so best er at royna at finna inn á rás mína aftur.

Tíð eru pengar verður sagt, og tíðin skal ikki søplast burtur. Hetta vil kortini ikki siga, at vit ikki eisini kunna njóta tíðina, liggja á sofuni og ”lada upp”, sum onkur segði, ella spáka okkum ein túr, ella renna, sum nógv gera. Ella bert lata tankarnar sveima, droyma seg burtur á hugans leiðir, har alt er gott og ljósareytt. Ein arbeiðssamur maður, sum eg kenni, segði at hann elskaði teir dagar, tá hann einki hevði at gera.

Hinvegin eru vit menniskju tíverri ikki innrættað soleiðis, at um vit bert fáa tíð, so fáa vit útrætta tað ótrúliga. Tað er ikki so. Hugflogið er ikki altíð har. Tað eru løtur har flogið er lætt og so eru tað aðrar løtur sum eru sum í tjúkksendi, har alt fellir tungt og einki kemur burturúr. Tíðin er eitt, men hon er ikki nógmikið.

Spurningurin er so, hvat øll henda ítøkiliggerðingin og mátingin av tíð ger við okkum menniskju, er tað gott ella ringt fyri okkum altíð at verða so medvitað um tíðina. ”Jú”, sigur onkur, ”tað er neyðugt at hava so gott skil á allari tíðini, fyri at tú eisini skalt kunna fáa góða tíð til tað, sum tú vilt hava góða tíð til, annars fer helst nógv tíð til einkis”.

Eg kom t.d. einar tríggjar tímar ovseint í gongd við at skriva hesar hugleiðingarnar, tí eg og døtur mínar fullu í prát. Skal eg illneitast inn á tað ella skal eg gleða meg yvir ta kvalitetstíð, sum er her ótilætlað fekk saman við yngra ættarliðinum?

Í ár vóru jólini stutt, men jólastákið hevur ikki kravt minni tíð fyri tað. Flestu familjur hava eina fasta skipan av jólatíðini. Ungar familjur, sum fyri fyrstu ferð skulu halda jól saman, hava tikið fleiri avgerðir, sum koma at ávirka jólini frameftir. Konan er kanska von við at fáa ræstan fisk og sperðil jólaaftan og maðurin er kanska vanur við at fáa ein ræstan bógv jólaaftan. Onnur eru kanska von við at fáa dunnu ella gás jólaaftan. Heima hjá okkum endaði tað fyri mongum árum síðani við, at semja var um at byrja jólini við at eta ræstan fisk og sperðil tollaksmessudag og at seta ein bógv við rivum í ovnin jólaaftan. Dunnurnar verða etnar jóladag eftir kirkjutíð. Annan jóladag hevur vanliga verið etið ræst kjøt, men ikki altíð, tað veldst um so nógv annað.

Á jólum seta vit saman við familjuni skap á ein part av okkara tíð – um jólini eru kvalitetstíð ella ei, tað vita fólk best sjálvi, men man ikki tan mest einskilda ella privata løtan í familjulívinum verða jólaaftan, tá alt mestsum steðgar upp og hvør hús eina løtu hevur nóg mikið í sær sjálvum.

Eitt nýtt ár er nú byrjað – tað gamla árið er farið. Vit hava brent bál og skotið rakettir og buldrað nógv um ársskifti. Hetta fyri at rudda burtur tað gamla og rudda slóð fyri tí nýggja. Vit vita, hvat er hent í tí árinum, sum farið er, men hvat tað nýggja árið kemur at bera í sær fyri okkum av góðum og illum, tað vita vit ikki uttan kanska figgjarlógina og hvussu skattaprosentið verður í teimum einstøku kommununum.

Gott nýggjár øll somul og Harrans signing í komandi ári.